UTTANRÍKIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ
INNANHÝSIS

Tórshavn, tann 19. mars 2019
J. Nr.: 19/00056

**Upprit í sambandi við viðgerð í Vinnunevndini av løgtingsmáli nr. 147/2018**

**Broytingaruppskot**

1. § 5 verður orðað soleiðis:
   ”Stk. 1. Henda løgtingslóg kemur í gildi 1.juli 2019.
   Stk. 2. Landsstýrismaðurin ásetir í kunngerð, nær § 58 a, stk. 2, 1. pkt., sum ásett í § 1, nr. 4, § 15 g, stk. 2, 1. pkt., sum ásett í § 2, nr. 3, § 56 b, stk. 2, 1. pkt,. sum ásett í § 3, nr. 3, og § 17, stk. 4, 1. pkt., sum ásett í § 4, nr. 2, koma í gildi. Landsstýrismaðurin kann áseta skiftisskipanir.”

**Viðmerkingar**

Í upprunauppskotinum eru ásetingar um m.a.:

- Feløgini skulu savna upplýsingar um veruligu eigararnar av feløgun, undir hesum rættindi hjá teimum veruligu eigarunum.

- Upplýsingarnar skulu skrásetast í kt-skipan Skráseting Føroya.

- Feløgini skulu goyma upplýsingarnar um veruligu eigararnar í fimm ár eftir, at veruligu eigaraviðurskiftini hildu uppat, og um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í fimm ár eftir, at royndirnar at eyðmerkja vórðu framdar.

- Eisini skulu feløgini eftir áheitan útflýggja upplýsingar til Føroya Landfúta um veruligu eigararnar, undir hesum um royndir at eyðmerkja veruligar eigarar, og skulu harumframt eftir áheitan útflýggja nevndu upplýsingar til aðrar almennar myndugleikar, tá ið hesir myndugleikar meta, at upplýsingarnar eru neyðugar fyri røkt av teirra eftirlitsuppgávum ella umsjónaruppgávum.

Fíggjarmálaráðið hevur víst á, at í sambandi við at Global Forum skal gera “review” av Føroyum seinni í vár, er tað av stórum týdningi, at reglurnar um, at Føroya Landfúti og TAKS hava atgongd til upplýsingar um veruligar eigarar og TAKS, eru í gildi.

Tað er ikki møguligt, sum er, at skráseta veruligar eigarar í kt- skipan Skráseting Føroya við tað, at kt-skipan Skráseting Føroya ikki er tillagað til tað enn.

Eftir upprunauppskotinum fær landsstýrismaðurin tí heimild til at seta lógina í gildi við kunngerð.

Teir partar av ásetingunum, sum ikki snúgva seg um kt-skipan Skráseting Føroya kunnu tó setast í gildi beinanvegin, hóast kt-skipan Skráseting Føroya ikki enn er tillagað. Hetta fevnir millum annað um reglurnar um skylduna hjá feløgunum at savna og goyma upplýsingar um veruligar eigarar, og skyldan at lata upplýsingar til Føroya Landfúta og TAKS.

Skotið verður tí upp at broyta ígildiskomuásetingina í § 5 í upprunauppskotinum soleiðis, at lógin fær gildi 1. juli 2019, og at landsstýrismaðurin fær heimild til at seta tann partin av ásetingunum, sum viðvíkur skrásetingarkravinum, í gildi við kunngerð.

Hinir partarnir av lógaruppskotinum verða settir í gildi 1. juli 2019, m.a. skyldan hjá feløgunum at savna upplýsingar um veruligu eigarar, og skyldan at lata upplýsingar til Føroya Landfúta og TAKS.

Serligu viðmerkingarnar til § 5 í upprunauppskotinum verða annars óbroyttar:

"Landstýrismaðurin kann áseta skiftisskipanir. Tørvur kann vera á hesum, um tað verður ásett eitt tíðarskeið ímillum at kt-skipanin kemur í rakstur og til upplýsingarnar í skipanini verða alment atkomuligar.

Í hesum uppskotinum verða í § 1, nr. 3 tvær nýggjar greinar, § 15 g og § 15 h, settar inn í vinnufyritøkulógina aftan á § 15 f. Í galdandi vinnufyritøkulóg er eingin § 15 f, men verður § 15 f sett inn í lógina í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (striking av handhavapartabrøvum), sum verður lagt fyri Tingið samstundis sum hetta uppskotið. Lógartekniskt er tí neyðugt, at §§ 15 g og 15 h í hesum uppskotinum verða settar í gildi samstundis við § 15 f í uppskotinum til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um parta- og smápartafeløg (striking av handhavapartabrøvum)."

**Viðmerkingar frá Dátueftirlitinum aftan á at uppskotið varð latið Løgtinginum**

Víst verður til viðmerkingarnar, sum Dátueftirlitið í t-posti 6 og 13. ebruar 2019, aftan á at uppskotið varð latið Løgtinginum, lat Uttanríkis- og vinnumálaráðnum til løgtingsmál nr. 147/2018

***Viðvíkjandi spurningum um lógaruppskotið er í samsvari við §§ 8-10 í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum (persónsupplýsingarlógin)***
Uttanríkis- og vinnumálaráðið skal vísa til Uttanríkis- og vinnumálaráðsins viðmerkingar í pkt. 1.5. Ummæli og ummælisskjal til ummælið frá Dátueftirlitinum.

Av hesum framgongur, at upplýsingar um veruligar eigarar og royndir at eyðmerkja veruligar eigarar í byrjanarstøðu ikki eru viðkvæmar upplýsingar. Tann viðgerð av persónsupplýsingum, sum kann fara fram sbrt. lógaruppskotinum, kann tí fara fram innanfyri karmarnar av persónsupplýsingarlógini, sbr. tó niðanfyri.

Dátueftirlitið hevur ikki konkret mett um, hvørt lógaruppskotið er í samsvari við løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum (persónsupplýsingarlógin), tí tíðin loyvdi tí ikki. sbr. ummæli frá Dátueftirlitinum, sum er lagt við upprunauppskotinum,

Ásetingarnar í uppskotinum samsvara við donsku LOV nr 262 af 16/03/2016 Lov om ændring af selskabsloven, lov om visse erhvervsdrivende virksomheder, lov om erhvervsdrivende fonde og forskellige andre love (Indførelse af register over reelle ejere). Tá tað snýr seg um viðgerð av viðkvæmum upplýsingum, var tá galdandi danska dátulógin lík føroysku persónsupplýsingarlógini.

Víst varð tí til viðmerkingarnar til tað uppskotið, har tað m.a. fylgjandi framgongur:

> "Datatilsynet har dog tilkendegivet, at det ikke kan udelukkes, at der kan være tilfælde, hvor en oplysning om forsøg på identifikation af reelle ejere vil have karakter af en oplysning om strafbare forhold, jf. persondatalovens § 8. Den indsamling, opbevaring og videregivelse af oplysninger, som selskaber, fonde og lignende foreslås at være forpligtede til at foretage efter lovforslaget, vurderes ikke i alle tilfælde at kunne ske inden for de rammer, som persondatalovens § 8 sætter for privates behandling af oplysninger om bl.a. strafbare forhold. Lovforslaget indebærer således på dette punkt en fravigelse af persondataloven."

Metingin, sum danska Datatilsynet gjørdi av uppskotinum til donsku LOV nr 262 af 16/03/2016, og viðmerkingarnar í tí sambandinum kunnu eisini verða nýttar viðvíkjandi hesum uppskotinum.

**Lóglig og saklig endamál**
Dátueftirlitið vimerkir m.a.,at "*tað er ikki í tráð við persónsuplýsingarlógina bara at lata myndugleikan "meta um ", hvørt ein persónsupplýsing er hent at hava. Tað má setast inn í viðmerkingarnar hvørjar persónsupplýsingar, ið kunnu vera neyðugar at viðgera, og at hetta bert skal vera við ávísum lógligum og sakligum endamáli fyri eygað so sum ásett er í § 8 í persónsupplýsingarlógini.*"

Tað gongur greitt fram av lógarásetingunum og almenni og serligu viðmerkingunum til ásetingarnar ú uppskotinum, hvørjar upplýsingar skulu savnast og skrásetast, og sum eru sakligar og neyðugar, t.e. upplýsingar, sum kunnu eyðmerkja veruliga eigaran og upplýsingar um hansara rættindi í felagnum.

Eitt felag ella ein myndugleiki kannsostatt ikki savna og skráseta upplýsingar, tí mett verður at "ein persónsupplýsing er hent at hava".

***Viðvíkjandi spurninginum um latan av upplýsingum til Føroya Landfúta***
Slíkar ásetingar eru ikki óvanligar í lóggávuni. Víst kann verða til t.d. § 20 løgtingslóg um góðkendar grannskoðarar og grannskoðanarvirkir, har tað er ásett, at grannskoðari felagsins skal
boða Føroya Landfúta frá um illgruni er um, at ein ella fleiri limir í leiðsluni hjá virkinum fremja ella hava framt fíggjarlig brotsverk í sambandi við sítt starv.

Líknandi ásetingar eru í hvírvasklóggávuni, og í uppskotinum til nýggja hvitvasklóg á bankaøkinum oa. løgtingsmál nr. 131/2018: Uppskot til ríkislógartilmæli um at seta í gildi fyri Føroyar Anordning om ikrafttræden for Færøerne af lov om forebyggende foranstaltninger mod hvidvask og finansiering af terrorisme (hvidvaskloven). Víst verður til m.a. § 26, stk. 1 í tí uppskotinum, sum ásetur:

**"§ 26.** Virksomheder og personer skal omgående underrette Statsadvokaten for Særlig Økonomisk og International Kriminalitet, hvis virksomheden eller personen er vidende om, har mistanke om eller rimelig grund til at formode, at en transaktion, midler eller en aktivitet har eller har haft tilknytning til hvidvask eller finansiering af terrorisme. Det samme gælder ved mistanke, der er opstået i forbindelse med kundens forsøg på at foretage en transaktion eller en henvendelse fra en mulig kunde med ønske om gennemførelse af en transaktion eller aktivitet."